

*– Eg havi so ongantíð í mínari tíð við landsliðnum upplivað eina slíka móttøku, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi*

*Savnsmynd*

# Víkingur í turkiska hitanum

**EVROPA LEAGUE** Spælararnir hjá Víkingi kunnu vænta sær eitt sjokk, tá hóskvøldið teir trína inn á vøllin ímóti turkiska stórfelagnum, Besiktas

**Hilmar Jan Hansen**

Longu í lufthavnini niðri í Turkalandi fingu teir í Víkingi mánadagin fyrsta forsmakkin uppá, hvat teir kunnu vænta sær, tí einir 25 journalistar stóðu og tóku ímóti. Tað var í øllum førum annað og meira, enn teir ljósabláu eru vanir við, tá teir spæla í Sarpugerði...

– Eg havi so ongantíð í mínari tíð við landsliðnum upplivað eina slíka móttøku, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, ið hevur forhoyrt seg eitt sindur um, hvussu tað man vera, tá spælararnir skulu inn á vøllin á BJK Inönü Stadium í annaðkvøld klokkan 19, føroyska tíð.

– Vit eru blivnir ávaraðir um, at tað er ein uppliving fyri seg, fyri ikki at siga eitt sjokk. Spælararnir koma helst at fáa eina løtu, ið er nokk so nógv øðrvísi enn nakað av tí, teir eru vanir við, men júst tað royna vit eisini at tosa um og fyrireika okkum til áðrenn.

Besiktas JK er eitt av stórfeløgunum í Turkalandi, og lítið man vera at ivast í, at her fær Víkingur nógv ta harðastu mótstøðuna, nakað av føroysku liðunum kann vænta sær í ár. Venjari er Bernd Schuster, sum fyrr hevur verið í eitt nú Real Madrid, og undir sær hevur hann kendar spælarar og stjørnur sum Rüstü Recber, Nihat Kahveci og Ricardo Quaresma.

– Sjálvt um mótstøðan kann tykjast ræðandi, eru spælararnir bæði spentir og motiveraðir. Teir vita, at tað ræður um at royna at spæla, tí vit koma ongan veg, um vit bara liggja og sparka bóltin burtur. Verjuspælið má vera kompakt og tætt, tí annars verður tað alt ov lætt hjá hinum, sigur Jógvan Martin.

– Uppgávan er stór, men vit fara at royna at gera okkara besta. Vit eru farnir niður higar í góðari tíð, tí vit vistu eisini, at hitin var øgiligur. Um dagin eru 34 hitastig, men um kvøldið, tá dysturin verður spældur, fer tað at liggja um tey 30. Tað er ríkiliga heitt hjá okkum, men soleiðis eru umstøðurnar.




Áhugin millum turkiskar fjølmiðlar er øgiligur. Her verður samrøða gjørd við formannin í Víkingi, Páll Gregersen, meðan ikki færri enn tvey upptøkutól snurra...

*Mynd: vikingur.fo*

# HB hevði ongan kjans

**CHAMPIONS LEAGUE** Við nógva hitanum og sterkari mótstøðu ímóti sær, munaði HB einki í útidystinum í gjárkvøldið ímóti FC Red Bull Salzburg, sum vann ein greiðan og uppibornan 5-0 sigur

**Hilmar Jan Hansen**

Sum fryktandi var fyri áðrenn, gjørdist talan um ein dyst, har HB mestsum alla tíðina rann aftaná og ongantíð fótaði sær. Við kvikum og skjótum álopsspæli setti FC Red Bull Salzburg dagsskránna á heimavøllinum og kundi saktans havt vunnið uppaftur meira.





Hagtølini aftaná søgdu, at vertirnir høvdu heilar 26 skotroyndir, meðan HB bara hevði fýra, sum allar komu av miðvøllinum, tí Fróði Benjaminsen átti tvær av teimum og Milan Kulic ta einu, umframt at Rógvi Poulsen hevði eitt skot, sum ikki rakti málið.

– Hetta var sjálvandi eitt øgiliga gott lið, sum vit spældu ímóti, men vit gjørdu eina rúgvu av feilum, og tá verður tað uppaftur tyngri. Haraftrat var tað tungt at spæla í hitanum, tí meðan dysturin var, vóru um 30 hitastig. Men skalt tú hava úrslit burtur úr slíkum dystum, mugu allir vera førir fyri at geva minst 100 prosent, og tað megnaðu vit ikki, sigur Fróði Benjaminsen, liðformaður hjá HB.

– Teir vóru frammanfyri 2-0 í hálvleikinum, men tá teir so skoraðu til 3-0 beinanvegin í seinna hálvleiki, var tað fyri okkum sum at fáa ein frammaná, tí vit høvdu í steðginum tosað um, at vit – um ikki annað – skuldu royna at vinna seinna hálvleik ella at halda teimum frá at skora. Tað eydnaðist ikki, so tí gjørdist mótbrekkan øgilig.

HB megnaði at halda tætt í góðar 20 minuttir, so kom fyrsta málið. Stutt fyri hálvleik kom so eitt aftrat, og beinanvegin í seinna hálvleiki fekk FC Red Bull Salzburg tað triðja. Eitt korter seinni var 4-0, og átta minuttir fyri dystarenda staðfestu vertirnir 5-0 sigurin.



– Tað er sjálvandi ikki longur ein spurningur um at koma víðari, men á heimavølli fara vit eisini at royna vinna. Tá krevst sjálvandi, at allir eru klárir, tí tað verður ikki lætt. Men um ikki annað, so sleppa vit nokk undan at spæla í 30 hitastigum tá, staðfestir HB-liðformaðurin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

*Myndir: www.redbulls.com*

**UEFA Champions League** · Red Bull Arena, Wals-Siezenheim, 13. juli 2010 kl. 17.00

## Red Bull Salzburg - HB 5-0 (2-0)

**1-0: Gonzalo Zarate, 21.**
**2-0: Jakob Jantscher, 43.**
**3-0: Andreas Ulmer, 46.**
**4-0: Roman Wallner, 63.**
**5-0: Stefan Hierlander, 82.**
Dómari: Igor Satchi, Makedonia

**Red Bull Salzburg:** Gerhard Tremmel – Christian Schwegler, Franz Schiemer, Ibrahim Sekagya, Andreas Ulmer – David Mendes da Silva (Simon Cziommer, 60.) – Christop Leitgeb, Jakob Jantscher – Gonzalo Fulogio Zarate, Dusan Svento (Nikola Pokrivac, 60.) – Roman Wallner (Stefan Hierlander, 75.)
***Gult kort:*** Nikola Pokrivac
**HB:** Marcin Dawid – Pætur Jørgensen, Þórður S. Hreiðarsson, Hans á Lag (Rógvi Holm, 77.), Hendrik Rubeksen – Símun Samuelsen, Fróði Benjaminsen, Vagnur Mohr Mortensen, Milan Kulic (Levi Hanssen, 59.), Rógvi Poulsen – Andrew av Fløtum (Tór-Ingar Akselsen, 75.)